

Mynd: Maersk

# Norski oljugrunnurin sera vánaligt úrslit

**Jógvan Hugo Gardar**

28.10.2015 - 21:15

Oljan.fo

Oljuprísurin og ófriður á paratabrævamarknaðunum raka norska oljugrunnin. Oljugrunnurin er bygdur upp av yvirskotinum frá norsku oljuframleiðsluni, og grunnurin skal við íløgum tryggja at grunnurin veksur. Hann skal tryggja komandi norsku ættarliðum eitt vælferðarsamfelag sum minnir um tað Noreg hevur í dag.

Bloomberg News skrivar í dag at norski oljugrunnurin rættuliga hevur fingið harða viðferð í heyst, og undirskotið er tað størsta farnu fýra árini.

Grunnurin misti 217,5 milliardir danskar krónur, svarandi til 4,9 prosent av virðinum, í triðja ársfjórðingi.

Stjórin fyri grunninum, Yngve Slyngstad, sigur sambært Bloomberg News at ein eigur at gera sær greitt at ein má rokna við sveiggjum í virðunum, tá marknaðurin er so ófriðarligur sum hann hevur verið í heyst.

- Yvir tíð hevur grunnurin tó eina sera sterka og góða støðu, sigur Slyngstad.